FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 13. apríl 2022
J. nr.: 22/07445
Viðgjørt: AE

Svar til fyrispurning nr. 52-161/2021 frá Sámal Hanni Lognberg, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Una Rasmussen, um grótkastið uttanfyri Boðakeiina í Skopun.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvat ætlar landsstýrismaðurin at gera við tað, at alt grótið frá grótkastinum, sum varð lagt í nítiárunum, er endað inni á Pollinum í Skopun?

2. Nær verður farið undir at gera grótkastið aftur?

3. Nær ætlar landstýrismaðurin, at arbeiðið skal gerast at taka alt grótið upp, sum liggur inni á Pollinum í Skopun?

Svar:
Sum kunnugt varð eitt grótkast lagt uttan fyri Boðakeiina í nítiárunum, ið er uttasti pirurin í Skopun. Brimverjan var tó ongantíð gjørd nøktandi liðug, tí grótið ikki var tryggjað við størri dekkgróti, ella við eini gátt. Hetta hevur gjørt at grót av og á hevur riðið oman í innsiglingina, soleiðis at innsiglingin ikki hevur verið nóg djúp. Landsverk hevur eftirlitið við hesum og ger javnan uppmátingar í innsiglingini, til tess at tryggja at dýpið er í lagi til at Teistan trygt kann sigla inn í havnina.

Innsiglingin til Skopunar havn er ruddað fyri grót nakrar ferðir. Seinastu ferð í 2020. Innsiglingin varð eftirkannað seint í 2021, og er dýpið í lagi til at Ternan kann sigla. Tó soleiðis, at nakað av grótið lá beint innanfyri pirin, men støðan inni á Pollinum er sambært Landsverki nærum óbroytt.

Eingin játtan er tøk til at gera grótkastið aftur uttan fyri Boðakeiina, ella til at taka grót upp á Pollinum.

Áhugamálini hjá landinum eru fyrst og fremst at tryggja eitt gott ferðasamband til Sandoynna, við at kunna brúka Skopunar havn til samferðsluhavn, inntil tað er landfast millum Sandoynna og Streymoy.

Tinganes, 13. apríl 2022

Uni Rasmussen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum